

*Her liggja Vágar so víðopnar fyri mær. Sæddar í 591 metra hædd av Húsafelli. Allar tríggjar Vágirnar eru at síggja, eins og bæði Tindhólmur og Mykines eisini sleppa upp í part*

*Mynd: Edvard Joensen*

# Birtir upp ættarlandsást í sál

**Tað er nakað serligt at sita á fjallatindinum og skoða oman yvir landið, har tú dagliga gongur og lítur øvugtan veg. Tú tráar at hæddunum, sum nú eru náddar, og heimurin liggur víðopin fyri tær. Tak hann til tín og njót tað**

GONGUFERÐ

*Edvard Joensen*

**Á Steigafjøllum:** Tað nemur nakað serligt við, her eg siti á einar fimhundrað metrar uppi og skoði yvir oynna, eg eri farin at kenna meg drignan at. Hesi perluni vestantil í landinum við teimum nógvu møguleikunum. Teir liggja bara og bíða eftir at verða brúktir.

Kristi himmalferðardagur er, og gott veður. Kanska eitt sindur køli, men klárt og stilt. Ein frálíkur dagur at fara á Steigafjøllini, sum eg enn eigi tilgóðar.

Tað er skjótt, at ryggsekkurin er pakkaður, og so til gongu. Einsamallur út í Dysjar. Havi valt at fylgja eggini niðan á Nípurnar og haðani á Krosstind.

Tað gongur skjótt út eftir Trøð. Komi út á Skoragarðin og fylgi honum. Vendi mær einar tvær ferðir at hyggja at landslagnum.

Har stendur Klovningur og sær út, sum vil hann fyri alt í verðini sleppa at landi aftur. Tað tykist, sum hevur hann angrað, at hann loysti frá oynni, hóast hann neyvan sjálvur man hava verið orsøk til tað.

Og undir mær eitt sindur burtur frá er Trøllkonufingur. Hann sæst ikki so væl hiðani, sum hann ger longri niðri. Men eg veit, at hann er her.

Hyggi inn í skorarnar. Flesaskorarnar hevur Heini einaferð sagt mær, at tær nevnast, so tað man vera á eini leið. Nevndar eftir flesini, sum liggur fyri landi, vildi hann vera við. Har skal vera so ringt at ganga, tí tað er so harðvallað.

Eg taki kikaran fram og fari at kika út yvir havið. Hyggi eftir grind. Tað er einki dulsmál.

Men har var eingin grind at síggja. Bara streymkurlar á havinum. Einastaðni langt suðuri í havinum, sum kortini bara vísir seg at vera vestur úr Trøllhøvda fer eitt farmaskip vestur í hav. Ein hósdag. Dugi ikki at ímynda mær, hvør ruta tað kann vera. Men kanska er tað ein russi, sum hevur ligið í Nólsoyarfirði og ikki fylgir nakrari fastari rutu?

Hann fer sína kós, og eg haldi fram. Ætli mær minst tvey fjøll í dag, so eisnki er at bíða eftir.

Eg taki meg longri niðan, og alt meira leggjast Vágar opnar fyri mær. Og Streymoyggin hinumegin. Suður á Dalarnar og norður gjøgnum sundið. Dalanípan stendur so skørp, samstundis sum Prestlandið hinumegin bara kennist alt longri burtur.

Har liggja nakrir steinar har uppi á slættanum. Sígja út, sum eru teir lagdir av onkrum, sum her hevur verið.

Mær rennur í hug, at á Trælanípuni er skrivað eitthvørt, sum helst er ætlað sum ein heilsa til flogferðafólk, sum strúka tvøruturyvir. Men hesir eru so smáir, at teir eru neyvan ætlaðir fólki at lesa úr einum flúgvaravindeyga.

Nei, tað vóru teir ikki, helt eg meg síggja, tá eg kom til teirra. Men kanksa onkrum, sum situr enn hægri uppi. Steinarnir eru lagdir soleiðis, at teir mynda eittans orð. JESUS.

Ivaleyst einhvør ungdómsbólkur, sum kanska hevur verið á legu í missiónshúsinum og gjørt útferð niðan higar? Hvør veit. Ella bara onkur annar, sum hevur kent trongd at senda eina heilsu at hægri hæddum.

Og eg haldi fram at taka meg móti hæddunum. Tað er ein góður tími, síðan eg fór heiman, og eg havi líkasum sett mær fyri at náa Krosstindi innan hálvanannan tíma. Tað tykist at fara at betra til. Og tað eydnast. Tað mangla fimm minuttir í.

Leggi ryggsekkin av mær, taki myndatólið úr og fari upp á sjálvan tindin. Upp um krossin og á toppin. Har liggur Oknadalur. Eitt sindur særdur í útriðuni. Lopið er niður á helluna, og tað sær út til, at eitt stórt lop er væntandi, tí stórur partur av bakkanum stendur og lavar útyvir.

Oknadalsskor er undir mær, og longri suðuri er Flogið, er mær sagt. Har skal vera rættiliga ringt at ganga. So mikið ringt, havi eg frætt, at hundurin hjá Niels Mariusi datt oman.

Eitt lítið lot er eystaneftir, og tað kølnar skjótt her uppi. So eg sleppi mær niður av aftur og seti meg í læ. Taki termofløsku og matpakka úr ryggsekkinum, og seti meg at fáa mær ein heitan munn.

Tað dunar í vestri, og skjót fer eitt blátt flogfar gjøgnum loftið. Lægri enn eg siti fer tað framvið. Tó so mikið burtur, at tey neyvan vita av mær kortini, hóast eg lyfti krússinum til heilsan.

Men nú er morgírigheitin reiðiliga vaknað. Hálvanannan tíma á Krosstind, so má tað bera til at náa Húsafelli innan tveir tímar. Pakki saman og so til beins. Niður í skarðið og upp aftur brekkuna hinumegin. Men tað var einki fyri. Gott og lætt at ganga, og tað vóru væl minni enn tveir tímar lidnir, frá tí eg fór heiman, til eg sat á Húsafelli.

Tað kemur ein maður niðan gjøgnum dalin undir mær. Hann steðgar á. Kikar. Hevur helst sæð meg fara eftir skarðinum og roynir at finna út av, hvør hatta er.

Einsamallur er hann. Døkt klæddur. Gongur spakuliga. Setir seg viðhvørt. Hevur stav í hondini. Reisist, gongur eitt sindur,

*Framhald á síðu 32*








- Bensin
- Auto-diesel
- Bilvøra
- Kioskvøra
- Grillvøra

- Bakaravøra
- Kolonialvøra
- Filmar
- Fløgur
- Kaffi við ábiti

Mánad. til leygard. 8.00 - 23.00
Sunnud. 14.00 - 23.00

Statoilstøðin í Sørvági
tel 332855

- Bygningstilfar
- Byggikram
- Amboð
- Máling
- Búnýti

- Gólvtex
- Gólvvinyl
- Lamet
- Parket
- El lutir

Mánad. til fríggjad. 8.00 - 17.30
Leygard. 8.00 - 12.00

Handilsvirkið NICLASEN
tel 332001 - Fax 332050 - www.niclasen.net
epost niclasen@niclasen.net

Hjørleif Joensen
- Alt á einum stað...

Tlf. 332379 & 210379 Fax: 332914 | - Heildarloysn | - Bókhaldsvirki - Telduútgerð | - Fiskireiðskapur - Bátaútgerð



Alt á einum stað

Bókhaldsvirki
- Roknskap
- Teldur
- Telduútgerð

Elsta bókhaldsvirki í Vágum.
Í 26 ár hava vit avgreitt øll viðurskifti í hesum sambandi. Hava bókhald fyri virkir innan flestu yrkisgreinar. Vit selja, umvæla og viðlíkahalda teldur, eisini hava vit alt innan telduútgerð.

Sjóbúð
- Fiskireiðskapur
- Nautiskútgerð
- Bátaútgerð
- Sjóklæðir

Alt innan snellu- og línufiskiskap. t.d.: Nylon, húkar, lodd, svøvlar, línu, línuhúkar, vørp o.a. Eisini útgerð til frítíðarfiskarar.

Hjørleif Joensen
Bókhaldsvirki & Sjóbúð
FO-370 Miðvágur
tel 332379
fartel 210379
www.vagabokhald.com
vagabokh@post.olivant.fo

Radarar, ekkolod, plottarar, vhf, ljóskastarar, antennur, kumpassir o.a. Viskarar, kontaktir, floytur, lúðrar, filtur o.a. Oljuklæðir, styvlar, handskar, termoundirklæðir, draktir v.m.

Bókhaldsvirki Bátaútgerð Hjørleif Joensen